## Sjúkrarøktarfrøðingur til Eygnadeildina

Á Eygnadeildini er eitt fast starv á starvsbrøki 0,5 sum sjúkrarøktarfrøðingur leyst at søkja til setan 1. mai 2010.

Arbeiðið á deildini snýr seg í høvuðsheitum um kanningar og skurðviðgerðir. Skurðviðgerðir verða framdar bæði á Eygnadeildini og á Skurðgongini. Arbeiðið umfatar eisini sjálvstøðugar kanningar við ymiskum tólum.

Deildin er eitt spennandi og mennandi starvsstað við nógvum framtíðar avbjóðingum. Tí søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingi, sum hevur:

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- hug til tvørfakligt samstarv
- ynski um mennandi avbjóðingar og ynski um ávirkan á fakligu menningina
- Kreativitet og fleksibilitet

**Vit kunnu bjóða:**

- góða innleiðslu
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at ringja 304500 til Hergerð Heldarskarð, virkandi leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er 26. mars kl. 12.00**

## Læknaskrivari til Neurologiskt ambulatorium

Á Medisinska deplinum, Neurologiskt ambulatorium er eitt fulltíðar projektstarv leyst at søkja til setan 1. apríl 2010 og eitt ár fram.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**

- at verða við til at gera mál og framtíðarætlanir í tøttum samstarvi við deildar- og depilsleiðsluna
- fyriskipa og samskipa arbeiðið í tøttum samstarvi við aðrar fakbólkar
- at verða við til at menna Neurologiskt ambulatorium

**Vit vænta, at tú:**

- hevur góð samstarvsevni
- hevur góðan røkjuskap
- hevur góðan telduførleika
- ert jalig/ur og opin fyri avbjóðingum

**Vit bjóða:**

- eitt starv, har tú sjálv/ur fært ávirkan á títt arbeiði
- møguleika fyri at menna teg fakliga eftir tørvi

**Krøv til umsøkjaran:**

- prógv sum læknaskrivari

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Sæunn Ólavsdóttir Hansen, leiðsluskrivara, telefon 304500, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin er 24. mars 2010 kl. 12.00**

Trivnaður

Sjúklingurin í miðdeplinum

Gransking & menning

Størv á Landssjúkrahúsinum



www.ls.fo

## Onnur leys størv (sí meira á www.ls.fo)

**Maskinmeistari**
Umsóknarfreistin er 15. mars

**Summarfrítíðaravloysarar**
Umsóknarfreistin er 20. mars

**Yvirlækni til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Læknavaktina**
Umsóknarfreistin er 15. mars

**Læknaskrivarar til Eygnadeildina**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingur til Neurologiskt ambulatorium**
Umsóknarfreistin er 22. mars

**Yvirlækni til Oyrna- nasa- og hálsdeildina**
Umsóknarfreistin er 26. mars

**Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðdeildina G1**
Umsóknarfreistin er 15. mars

## Læknaskrivari til Skurðdepilin

Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt tíðaravmarkað fulltíðarstarv á Skurðdeplinum leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Í fyrsta umfari er setanin 7 mánaðir, tó er møguleiki fyri leingjan.

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving sum læknaskrivari
- Dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- Góður røkjuskapur
- Góð starvsstarvsevni
- Hollur telduførleiki

Nærri fæst at vita við at ringja til Jan J. Poulsen, leiðsluskrivara á telefon 304500, lokal 5103.

**Umsóknarfreistin er 22. mars 2010 kl. 12.00**

## Sjúkrarøktarfrøðingur til G4/A3

Deildin er ein almennkirurgisk seingjardeild við servitan innan ortopedi, maga/tarm, urologi, gynækologi, eygna og ONH-sjúkum. Deildin virkar við tveimum eindum. G4, við 23 og A3 við 11 seingjarplássum.

**Vit søkja sjúkrarøktarfrøðing til:**

- eitt tíðaravmarkað starv vegna barnsburð í skiftandi vaktum á starvsbrøki 0,7 til setan 1. mai 2010 ella skjótast gjørligt

**Krøv til umsøkjararnar**

- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligur áhugi og royndir innan kirurgiska sjúkrarøkt
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og jalig/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar

Nærri fæst at vita við at ringja til Elin Vitalis, deildarleiðara á G4, tlf. 234544 ella til Hergerð Heldarskarð, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, tlf. 304500, lokal 5102.

**Umsóknarfreistin er 26. mars 2010 kl. 12.00**



Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Tað er umsøkjarans ábyrgd at umsóknin er Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freisti